# GERÐABÓK

**Dato:** 07. september 2017 **Kl**. 18:00
**Stað**: Býráðssalurin
**Málsnr:**

**FUNDARLEIÐARI:**
Annika Olsen

---

**VIÐ LUTTØKU AV:**
Helena Dam á Neystabø
Tróndur Sigurðsson
Halla Samuelsen
Bogi Andreasen
Jákup Dam
Gunvør Balle
Marin Katrina Frýdal
Turið Horn
Bergun Kass
Heðin Mortensen
Kaj Leo Holm Johannesen

**LUTTÓKU EISINI:**
Jóan Petur Hentze
Anna Havmand

**LUTTÓKU IKKI:**
Bjørghild Djurhuus, ið hevði forfall

**SKRIVARI:**
Bjørgfríð Ludvig

**PROTOKOLLFØRARI:**
Janus Isfeldt

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>07. september 2017 | Blað nr.: 2<br>Formansins merki: |

**Innihaldsyvirlit** **Síða**

**Til viðgerðar**


| | | | |
|---|---|---|---|
| 193/17 | 17/01364-6 | Annfinn Brekkstein farloyvi frá býráðnum | 3 |
| 194/17 | 17/02662-3 | Matr. nr. 135ap, Hoyvík. Eigari søkir um loyvi til víðarisølu av grundstykkinum. | 4 |
| 195/17 | 16/04742-2 | Matr. nr. 135kb, Hoyvík, eigari søkir um loyvi til víðarisølu | 6 |
| 196/17 | 16/03366-1 | Søla av grundstykkjum á Hamrabø í Kollafirði | 9 |
| 197/17 | 17/00433-4 | Umsókn um gerðabýti við Tórshavnar kommunu | 12 |
| 198/17 | 17/02798-12 | Føroyskt Íslandsrossafelag : Umsókn um víðkan av øki felagsins við Kráarheygg í Havnardali (2006-0321) | 15 |
| 199/17 | 17/01906-1 | Rakstur av høllini í Skúlanum á Argjahamri | 17 |
| 200/17 | 17/00303-1 | Góðkenning av mánaðarroknskapinum 2017 | 19 |

## ***193/17 Annfinn Brekkstein farloyvi frá býráðnum***

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 07.09.2017 | 193/17 | 17/01364-6 |

**Málslýsing:**
Annfinn Brekkstein hevur boðað frá, at honum berst frá at røkja starv sítt sum býráðslimur í meira enn samfullar 14 dagar.
Sambært § 18, stk. 3, í kommunulógini ger býráðið av, at treytirnar fyri innkallan av tiltakslimi, ið er Kaj Leo Holm Johannesen, eru loknar.
**Tilmæli:**

**Býráðsfundur 07. september 2017:** Einmælt samtykt.

# 194/17 Matr. nr. 135ap, Hoyv. Eigari søkir um loyvi til víðarisølu av grundstykkinum.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 07.09.2017 | 174/17 | 17/02662-3 |
| 2 Býráðsfundur | 07.09.2017 | 194/17 | 17/02662-3 |

**Málslýsing:**

Viðvíkjandi óbygdum grundstykki matr. nr. 135ap, Hoyvík. Jóansgøta18 – Hoyvík.
Vídd 500m2. Grundstykkið er planerað.

Eigarin søkir kommununa um loyvi til at selja grundstykkið , sum viðkomandi eigari keypti í fríðari sølu í 2015, keypsprisur kr. 1.050.000.

Av tí talan er um grundstykki, ið er selt hjá meklara til marknaðarprís, verður mett, at servituttinum um víðarisølu kann strikast. Hetta m.a tí kommunan við søluni hevur slept tillutanini og at marknaðarprísurin ger møguleikan fyri spekulatión sera lítlan. At strikað servituttin um víðarisølu hevur tann fyrimun, at kommunan er leys av at viðgera møgulig ynski um at avhenda grundstykki.

Viðvíkjandi strikan av servituttinum um byggifreist, ið vanliga er 2 ár, kann hetta innibera, at stykkið liggur óbygt í áravís, ið kann vera óheppi og ikki heilt í tráð við endamálið við kommunalum grundstykkjum. Eisini letur tað upp fyri spekulatión.

Verður avgerð tikin um, at at halda fast við vanligu byggifreistina má ásetast, hvussu skal farast fram, um freistin ikki verður hildin.

Tá talan er um grundstykki, ið kommunan tillutar í eini útstykking, er útgansstøðið, at kommunan kann krevja stykki afturskeyta um byggifreistin ikki verður hildin. Tá fær eigarin afturgoldið uppruna prísin umframt møguliga byggibúning, ið næsti keypari fær nyttu av.

Sami háttur kann eisini brúkast í hesum føri, tvs. hildið verður fast við byggifreistina og kommunan kann krevja stykki afturskeyta fyri tann prís, kommunan seldi tað fyri, um byggifreistin ikki verður hildin. Harvið er afturtøkuprísurin kendur fyri øll, eisini møguligar seinni keyparar.

Ein annar háttur kundi verið, at virðismett stykki ísv. afturtøkuna. Hesin háttur er ikki so einfaldur og kann m.a. skapa ónøgd, um virði er lægri enn tað, kommunan upprunaliga seldi stykki fyri og óheppi, um kommunan skal rinda munandi meir fyri stykki, enn tað var selt fyri.

**Tilmæli:**

Kommunustjórin og leiðarin og løgdeildini mæla til at:

1. servitturin um víðarisølu verður strikaður, tí talan er um sølu hjá meklara

2. fíggjarnevndin viðgerð, um byggifreist skal vera galdandi, tá talan er um sølu hjá meklara og um so er, hvussu fram skal farast ísv. møguliga afturtøku.

**Fíggjarnevndin 07. september 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum um at strika servituttin um víðarisølu og at halda fast um servituttin um byggifreist, og at kommunan kann krevja stykkið afturskeytað fyri tann prís, kommunan seldi tað fyri, um byggifeistin ikki verður hildin, og at beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 07. september 2017:** Einmælt samtykt.

# 195/17 Matr. nr. 135kb, Hoyvík, eigari søkir um loyvi til víðarisølu

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 18.01.2017 | 4/17 | 16/04742-2 |
| 2 Býráðsfundur | 26.01.2017 | 50/17 | 16/04742-2 |
| 3 Fíggjarnevndin | 07.09.2017 | 175/17 | 16/04742-2 |
| 4 Býráðsfundur | 07.09.2017 | 195/17 | 16/04742-2 |

**Málslýsing:**

Viðvíkjandi óbygdum grundstykki. matr. nr. 135kb, Hoyvík. Dýrindalsgøta 13, Hoyvík. Vídd 506m2. Grundstykkið er óútgrivið.

Seint í 2013 lýsti kommunan grundstykkið til sølu hjá ognarmeklara, og varð stykkið selt keyparunum í desember 2013 fyri kr. 750.000,00

Keyparin hevur upplýst, at hann hevur keypt eini sethús, og fer hann tískil ikki at byggja sethús á grundstykkið.

Skeytið vísir til verandi servituttir, sum áseta 2 ára byggiskyldu, og at ikki er loyvt at selja óbygda stykkið víðari uttan loyvi frá kommununi.

Kommunan selur sum meginreglu grundstykkir við ávísum treytum vegna ymisk áhugamál hjá kommununi.

Ein av hesum er, at víðarisøla ikki er loyvd, hetta fyri at forða fyri spekulatión í kommunalum stykkjum. Hetta er ein sera grundleggjandi treyt, ið eisini er vanlig í t.d. donskum kommunum.

Viðvíkjandi spekulatión, so hava verandi eigarar keypt stykkið í fríari sølu, har kapp bjóðað varð, og varð stykkið selt fyri 750.000,00

Verandi eigari hevur eisini haft aðrar kostnaðir í.s.v. keypið, og kemur at hava útreiðslur í.s.v. møguliga sølu.

**Tilmæli:**

Væntast kann, at stykkið nú kann seljast fyri ein hægri prís, men er altíð ein ávísur váði fyri lægri prísi.

Kommunustjórin og leiðarin á løgdeildini mæla til, at keypa grundstykkið aftur fyri kr. 750.000,00 + tinglýsingar útreiðslur kr. 8.500,00 = í alt kr. 758.500,00, og at lýsa grundstykkið til sølu til hægstbjóðandi.

Konto 6175. Keyp og søla.

**Fíggjarnevndin 18. januar 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 26. januar 2017:** Einmælt samtykt.

Ískoyti.

Av tí talan er um grundstykki, ið er selt hjá meklara til marknaðarprís, verður mett, at servituttinum um víðarisølu kann strikast. Hetta m.a tí kommunan við søluni hevur slept tillutanini og at marknaðarprísurin ger møguleikan fyri spekulatión sera lítlan. At strikað servituttin um víðarisølu hevur tann fyrimun, at kommunan er leys av at viðgera møgulig ynski um at avhenda grundstykki.

Viðvíkjandi strikan av servituttinum um byggifreist, ið vanliga er 2 ár, kann hetta innibera, at stykkið liggur óbygt í áravís, ið kann vera óheppi og ikki heilt í tráð við endamálið við kommunalum grundstykkjum. Eisini letur tað upp fyri spekulatión.

Verður avgerð tikin um, at at halda fast við vanligu byggifreistina má ásetast, hvussu skal farast fram, um freistin ikki verður hildin.

Tá talan er um grundstykki, ið kommunan tillutar í eini útstykking, er útgansstøðið, at kommunan kann krevja stykki afturskeyta um byggifreistin ikki verður hildin. Tá fær eigarin afturgoldið uppruna prísin umframt møguliga byggibúning, ið næsti keypari fær nyttu av.

Sami háttur kann eisini brúkast í hesum føri, tvs. hildið verður fast við byggifreistina og kommunan kann krevja stykki afturskeyta fyri tann prís, kommunan seldi tað fyri, um byggifreistin ikki verður hildin. Harvið er afturtøkuprísurin kendur fyri øll, eisini møguligar seinni keyparar.

Ein annar háttur kundi verið, at virðismett stykki ísv. afturtøkuna. Hesin háttur er ikki so einfaldur og kann m.a. skapa ónøgd, um virði er lægri enn tað, kommunan upprunaliga seldi stykki fyri og óheppi, um kommunan skal rinda munandi meir fyri stykki, enn tað var selt fyri.

Kommunustjórin og leiðarin og løgdeildini mæla til at:

1. servitturin um víðarisølu verður strikaður, tí talan er um sølu hjá meklara
2. fíggjarnevndin viðgerð, um byggifreist skal vera galdandi, tá talan er um sølu hjá meklara og um so er, hvussu fram skal farast ísv. møguliga afturtøku.

**Fíggjarnevndin 07. september 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum um at strika servituttin um víðarisølu og at halda fast um servituttin um byggifreist, og at kommunan kann krevjað stykkið afturskeytað fyri tann prís, sum kommunan seldi tað fyri, um byggifreistin ikki verður hildin, og at beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 07. september 2017:** Einmælt samtykt.

# 196/17 Søla av grundstykkjum á Hamrabø í Kollafirði

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 07.09.2016 | 264/16 | 16/03366-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 19.10.2016 | 328/16 | 16/03366-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 22.02.2017 | 18/17 | 16/03366-1 |
| 4 Býráðsfundur | 02.03.2017 | 66/17 | 16/03366-1 |
| 5 Fíggjarnevndin | 07.09.2017 | 173/17 | 16/03366-1 |
| 6 Býráðsfundur | 07.09.2017 | 196/17 | 16/03366-1 |

**Málslýsing:**
Í næstum er ætlanin at bjóða stykkini í útstykkingin á Hamrabøi í Kollafirði út vísandi til, at arbeiðið at gera vegin o.a. í økinum er farið í gongd.

Innan stykkini verða boðin út, er tørvur á, at áseta prís fyri stykkini.

**Tilmæli:**
Tilmæli og meira tilfar verður tókt innan fundin.

**Fíggjarnevndin 07. september 2016:** Útsett.

**Fíggjarnevndin 19. oktober 2016:** Útsett.

**Ískoyti:**
Byggibúningin av Hamrabøi verður ætlandi liðug í byrjanini av 2018.

Kommunan hevur biðið tveir meklarar um at virðismeta 12 tey vestastu stykkini, ið ætlanin er at selja fyrst. Metingarnar eru rættuliga eins og tær staðfesta, at kommunan ikki kann vænta at fáa kostprís fyri stykkini, ið kommunan vanliga brúkar sum søluprís og mett verður ikki, at tað er fíggjarliga ráðiligt at bíða við at selja stykkini.

Innkomnu metingarnar vísa, at vestastu stykkini hava eitt meðal virði á 248.750 kr. Um øll 22 stykkini verða seld fyri metta virði, verður samlaði søluprísurin 5.472.500 kr. Hetta gevur ein fermeturprís á 457,01 kr. fyri teir 11.974 m2 ið seldir vera.

Endaligi søluprísurin verður ásettur í mun til støddina á stykkinum.

Kostnaðir ísv. útstykkingina, við kommunalum MVG:

| | |
|---|---|
| Jarðarkeyp o.t | 3.386.707 kr. |
| Byggibúning (mett) | 7.450.000 kr. |
| Tilsaman | 10.836.707 kr. |

Av hesum eru játtaðar á íløguætlanini í alt 6.965.707 (j. Nr. 14/00865 og 15/00969)

Restin verður fíggjað við inntøku frá søluni.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin og leiðarin á løgdeildini mæla til at tilluta 12 tey vestastu stykkini sambært bíðilistanum fyri mett søluvirði á 470,01 kr/m2, vísandi til at tað ikki kann roknast við at prísurin fer at hækkað.

Um ikki øll 12 vestastu stykkini vera seld, so at seta restina av vestastu stykkjunum til sølu fyri 470,01 kr/m2 og síðan selja eystureftir.

**Fíggjarnevndin 22. februar 2017:** Ein meiriluti, Annika Olsen, Bergun Kass og Gunvør Balle, tekur undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Heðin Mortensen og Tróndur Sigurðsson, tekur ikki undir við tilmælinum, tí tilmæli ger mun á borgarum í Tórshavnar kommunu tí prísurin verður ymiskur, og krevur málið fyri býráðið, har minnilutin fer at koma við tilmæli.

**Býráðsfundur 02. mars 2017:** Fyrst varð atkvøtt um tilmæli frá Heðin Mortensen, Tróndur Sigurdsson, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Halla Samuelsen og Annfinn Brekkstein, mæla býráðnum til at seta grundstykkini í Kollafirði á sølulistan til kostprís. hetta sambært galdandi reglum. Umráðandi er, at borgarar í kommununi ikki vera forfordeildir, tá íð talan er um at ogna sær grundstykkir í kommununi. Tilmæli fall við 6 atkvøðum fyri og 7 ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Tróndur Sigurdsson, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Halla Samuelsen og Annfinn Brekkstein.

Ímóti atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Bogi Andreasen og Bergun Kass.

Síðan varð atkvøtt um meirilutatilmæli frá fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 7 atkvøðum fyri og 6 ímóti.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Bogi Andreasen og Bergun Kass.

Ímóti atkvøddu: Heðin Mortensen, Tróndur Sigurdsson, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Halla Samuelsen og Annfinn Brekkstein.

Heðin Mortensen, Tróndur Sigurdsson, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Halla Samuelsen og Annfinn Brekkstein metia, at samtyktin, sum er gjørd í hesum málið er ólóglig og skal boðað frá, at kært verður til innlendismálaráðið um hesa avgerð hjá meirilutanum í býráðnum. Biðið verður um, at øll skjøl í hesum málið eru taks at senda við kæruni

**Ískoyti**
Orsakað av, at ivi var um áhugan í at byggja í økinum varð ásett, at tillutanin av grundstykkjunum skuldi byrja vestanífrá. Nú stykkini eru boðin út til tey á bíðilistanum, og útstykkingin er vorðin alment kend vísir tað seg, at 11 á bíðilistanum ynskja at vera við í útlutanini, meðan fleiri, sum ikki er á bíðlistanum ynskja at verða við í almenna lutakastinum, sum skal vera um tey stykki, ið eru eftir, tá bíðilistin er avgreiddur.

Sostatt verða væntandi fleiri enn 12 stykki seld heilt skjótt, og harvið er ikki orsøk at býta útstykkingina sundur í tvey.

Tískil verður mælt til fyrst at luta øll 22 stykkini millum tey 11 á bíðilistanum við lutakasti eftir tí mannagongd, ið hevur verið nýtt higartil. Stykkini, sum ikki verða trekt í lutakastinum fara víðari til almenna lutakastið, sum øll kunnu melda til. Á henda hátt halda vit fast í aðalregluna um at tað er lutakast, ið avgerð hvussu stykkini verða býtt, og allir verandi og komandi borgarar verða javn stillaðir.

Tilmæli
Kommunustjórin, fyrisitingarstjórin og leiðarin á løgdeildini mæla til at tilluta øll stykkini eftir omanfyri lýstu mannagongd.

**Fíggjarnevndin 07. september 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 07. september 2017:** Einmælt samtykt.

# 197/17 Umsókn um gerðabýti við Tórshavnar kommunu

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 15.03.2017 | 58/17 | 17/00433-4 |
| 2 Fíggjarnevndin | 19.04.2017 | 91/17 | 17/00433-4 |
| 3 Fíggjarnevndin | 07.09.2017 | 176/17 | 17/00433-4 |
| 4 Býráðsfundur | 07.09.2017 | 197/17 | 17/00433-4 |

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Kommunan hevur fyrispurning frá eigaranum av matr. nr. 1384, við rundkoyringina við Eystara ringveg, um kommunan er sinna at makaskifta:

- Ogn sína, matr. nr. 1384 við rundkoyringina við Eystara ringveg, við
- Vinnustykki, matr. nr. 139ab, á Skarðshjalla, ið kommunan eisini skal átaka sær at asfaltera.

Sí Kort 1, myndir av matr. 1384 við Eystara ringveg og 139ab á Skarðshjalla.

Av tí at matrikulin er í umráðið C1 í tættari miðstaðarbygging, er tað avmarkaðir møguleikar fyri umbyggjan og nýbyggjan.

Orsakað av vánaligum atkomumøguleikum til matrikulin, verður byggiloyvi ikki givið bygningi við vinnuligum endamáli.

Um kommunan keypir matrikulin, kunnu plantast trø og runnar til prýðis, og møguleiki er eisini fyri at seta nakrar benkur til uppihald, tó skal havast í huga at útsýnið hjá ferðandi, má ikki skerjast. Økið er ábart fyri vesturættunum, so lívdin er ikki tann besta.
Hugsast kann, at økið kann brúkast til møguliga útbyggjan av rundkoyringina á Hálsi, ella gerð av súkklubreytum, men í løtuni eru ongar útbyggingar- ella broytingar ætlanir av rundkoyringini.

Eftir býarskipanarligum tørvi í dag, er tað ikki umráðandi at kommunan ognar sær matrikulin, einasta endamálið við keypinum í dag vil vera, at økið verður fríðkað, og húsið verður niðurtikið.

**Lógir, ásetingar o.a.**
**§ 19. Ásetingar fyri umráðispartarnar C1 í 3. grundumráði**
1 Umráðispartarnir verða í síni heild lagdir til miðstaðarbygging, t.e. handlar, skrivstovur, heilsubótarhøli, samkomuhús og tílíkt.
2 Útstykking innan teir einstøku umráðispartarnar verður einans loyvd serstakari byggisamtykt, sum byggivaldið hevur góðkent fyri umráðispartin.
3 Byggistigið má ikki fara upp um 0,4.
4 Nýtslustigið má ikki fara upp um 0,8.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Byggi- og umhvørvisdeildin hevur upplýst umsøkjara í skjal nr. 2011-1940-4, at hann kann taka verandi bygning niður og byggja ein annan tilsvarandi bygning í staðin, sum er eini sethús ella í mesta lagi eini dupulthús.

**Mál nr. 2011-1940-17 Fíggjarnevndin 23. mai 2012:** Fíggjarnevndin tekur ikki av tilboðið frá eigaranum, um at keypa av matr. 1384 fyri kr. 850.000,00 + tinglýsingarútreiðslur kr. 5.250,00. Um húsini skulu takast niður, er mettur kostnaður 100.000 afturrat.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
Í 2010 vendi Bank Nordik sær til kommununa og bjóðaði kommununi ognina við ringvegin fyri 1 mió. men kommunan ynskti ikki at keypa ognina fyri tann prísin, men kundi kanska ganga við til 750.000 kr., ið seinni bleiv lækkað til 500.000. Sølan bleiv ikki gjøgnumførd.Tá kunnaði kommunan Bank Nordik um, hvat økið kundi brúkast til, og har stendur m.a.: " Tó kann staðfestast, at bygt er í vinnuøkinum á Hálsi eftir leiðbeinandi skipanum fyri økið, sum eru gjørdar av kommununi í 1973 og revideraðar í sept. 1975. Av hesum skipanum framgongur, at matrikulin, sum húsini liggja á, er merkt sum "felagsøki, fyribils ikki alment" og sum "privat øki" á hesum kortskjølum, og vísir hetta, at ætlanin ikki er, at nýbygging skal fara fram á matr. nr. 1384, og at ætlanin hevur verið at leggja økið til felagsøki, tá húsini á økinum ikki longur standa har.

**Fíggjarlig viðurskifti, Notat um ognina 17/00433-3**
Núverandi eigari keypti ognina í 2015 fyri 1,1 mió.

Virði á stykkinum á Skarðshjalla er 1.038.700 og asfalteringin fer at kosta einar kr. 240.000 (út frá 300 kr./m$^2$), tilsaman kr. 1.278.400 kr.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at Løgdeildin fer í samráðingar við eigaran, um keyp av matrikul 1384 við Eystara Ringveg, fyri virði, ið matrikulin hevur í dag, og selur teimum vinnustykki á Skarðshjalla matrikul 139ab fyri kr. 1.038.700, umframt at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 15. mars 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í fíggjarnevndina og býráðið.
Gunvør Balle luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Ískoyti:**
Samráðst hevur verið við eigaran ið hevur endurtikið, at afturfyri matr. nr. 1384 Tórshavn ynskir hann matr. nr. 139ab á Skarðshjalla og at kommunan asfalterar øki. Hetta gevur ein samlaðan kostnað fyri matr. nr. 1384 á umleið 1,3 mió. kr. ið byggi- og býarskipanarnevndin ikki hevur ávíst fígging til.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin og leiðarin á løgdeildini mæla frá, at keypa ognina vísandi til, at ongar ítøkiligar ætlanir er við økinum.

**Fíggjarnevndin 19. apríl 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum frá kommunustjóranum og leiðaranum á løgdeildini.

**Ískoyti:**
Tekniski stjórin metir, at tað er sera týdningarmikið, at Torshavnar kommuna ognar sær matrikulin.

Talan er um eitt tað mest trafikeraða vegamótið í landinum og tað eru fleiri atlit kommunan eigur at taka ið í málinum. Eitt er tað býarskipanarliga og ferðslutekniska, eitt annað er árinini av tí virksemi ið kann koma á økið, um kommunan ikki keypir økið.

Matrikkulin liggur á einum horni og er ein framsíða ímóti býnum. Tað er ynskiligt, at øki er innbjóðandi fyri tey sum koma við bili ella til gongu. Við at keypa matrikulin kann kommunan betur skipa viðurskiftini í økinum, eisini við atliti til ferðsluviðurskiftini og parkeringsviðurskiftini í økinum. Við einum volla kann eitt parkeringsøkið á økinum avbyrgjast og fríðkast við vøkstri og saman við eini møguligari súkklubreyt gerst upplivingin hugaligari hjá fólki á súkklu ella til gongu.

Lagt verður upp til, at atkoman til parkeringsøkið verður frá Staravegnum, ið krevur eina marknaðarumskipan við Sp/f Berg Motors. Harafturat kann framsíðan við vegin og út ímóti býnum gerast ein onnur, sum í dag ikki er væl tillagað til nærumhvørvið við vegin, og tá verður høvi til at umskipa gongubreytinta fram við bygninginum hjá Sp/f Berg Motors, ið eisini vil økja trygdina hjá borgaranum.

Við at keypa ognina verða eisini fleiri avbjóðingar loystar. Ognin liggur í dag sum ein blindtarmur við skerdum atkomumøguleikum, og tí vildi tað verið ein avbjóðing at skipa eina íbinding í vegakervi, m.a. tí rundkoyringini er tætt við ogninga og talan er um nógv trafikeraðan høvuðsveg.

Tórshavnar kommuna hevur seinastu nógvu árini fingið nógvar umsóknir um økt og broytt virksemið á júst hesi ognini, ið vildi havt nógva ferðslu við sær. Kommunan hevur í fleiri førum noktað nýggja virksemið við støðið í táverandi byggisamtyktarásetingum. Hesar ásetingar eru nú broyttar fyri alt økið, og tað kann tí vera ein avbjóðing at noktað fyri einum virksemið á ognini, sum væl kann hugsast at hava økta ferðslu við sær og sum kanska ikki hóskar til øki.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at makaskifta matrikul 1384, Tórshavn, við vinnustykki á Skarðshjalla matrikul 139ab, Hoyvík, og at kommunan asfalterar øki á Skarðshjalla. Fíggja av 6175 keyp og søla og inntøkuføra 6975 byggibúning ídnaðarøki Skarðshjalli.

**Fíggjarnevndin 07. september 2017:** Samtykt at heimila umsitingini at samráðast við eigaran um at keypa ognina fyri ein lægri prís.

**Býráðsfundur 07. september 2017:** Tikið av skrá.

# 198/17 Føroyskt Íslandsrossafelag : Umsókn um víðkan av øki felagsins við Kráarheygg í Havnardali (2006-0321)

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 13.09.2017 | 179/17 | 17/02798-12 |
| 2 Fíggjarnevndin | 07.09.2017 | 172/17 | 17/02798-12 |
| 3 Býráðsfundur | 07.09.2017 | 198/17 | 17/02798-12 |

**Málslýsing:**
**33/06 2006-0321**

**Føroyskt Íslandsrossafelag, umsókn um víðkan av øki felagsins undir Kráarheyggi**
**í Havnardali.**
**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Føroyskt Íslandsrossafelag søkir um víðkan av leiguøkinum til ríðivirksemi í Havnardali.
Umboð felagsins hava verið á fundi við umsitingina og avrátt varð at søkja um at víðka
økið samsvarandi hjáløgdu tekning.
Matr. nr. partur av 1160a Flatnahagi.
Eigari: Tórshavnar kommuna.
Leigari: Júst Rubeksen.
Vídd: 60.260 m² (gl. øki. 28.520 m²).
Byggisamtykt: D2 ítróttur (partur av økinum) Harav 21.150m² eru í 4. grundumráði**.**
**Tilmæli:**
Býararkitekturin mælir til at ganga umsóknini á møti og at beina málið til fíggjarnevndina at gera nýggjan sáttmála við Føroyskt Íslandsrossafelag og at boða verandi leigara frá broytingunum.
**Byggi- og býarskipanarnevndin 6. februar 2006:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.
**Fíggjarnevndin 15. februar 2006:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og at broyta leigusáttmálan samsvarandi.
**Býráðið 23. februar 2006:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**Ískoyti:**
Samskift hevur verið við felagið um leigusáttmálan. Avtalað varð at brúka verandi sáttmála við teirri broyting, at víddin framyvir verður 60.260 m2, vísandi til. kortuppdráttinum í málinum. Við broytingini koma tey nýggju fjósini, sum felagið í næstum fer at byggja í Havnadali, at vera á økinum ið felagið leigar.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin og leiðarin á løgdeildini mæla til at gera ískoyti til sáttmálan, dagfestur 19. november 1992, soleiðis, at víddin framyvir verður 60.260 m2.

**Fíggjarnevndin 07. september 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 07. september 2017:** Einmælt samtykt.

## 199/17 Rakstur av høllini í Skúlanum á Argjahamri

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 15.06.2017 | 179/17 | 17/01906-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 20.06.2017 | 157/17 | 17/01906-1 |
| 3 Býráðsfundur | 20.06.2017 | 170/17 | 17/01906-1 |
| 4 Býráðsfundur | 07.09.2017 | 199/17 | 17/01906-1 |

**Málslýsing:**

Nú útbyggingin av Høllini í Skúlanum á Argjahamri verður liðugt útbygd, verður mett, at hon eigur at verða tikin úr rakstrinum hjá skúlanum og flutt til ítróttaanlegg, sum umsitur útleigan eftir skúlatíð og tímar til ítróttafeløgini og hevur vaktarskipan um kvøldið og í vikuskiftum.

Høllin er partur av játtanini hjá Skúlanum á Argjahamri deild 4121. Høllin er sostatt ikki eitt rakstrarstað, og tí er fermetratalið nýtt í útrokningini niðanfyri til raksturin av høllini.

| | FÆ 2017 | pr. $m^2$ | Høll við umkl.960 $m^2$ | í 5 mðr |
|---|---|---|---|---|
| lønir til reingerð | 1.217.879 | 187,37 | 179.871 | |
| el | 184.000 | 28,31 | 27.175 | |
| olja | 369.000 | 56,77 | 54.498 | |
| reinførisvørur | 65.000 | 10,00 | 9.600 | |
| viðlikahald | 176.000 | 27,08 | 25.994 | |
| **tilsamans** | **2.011.879** | | **297.139,05** | **123.808** |

Verður Høllin í Skúlanum á Argjahamri tikin úr rakstrinum hjá skúlanum frá august 2017, eiga 123.800 kr. at verða tiknar úr rakstrarjáttanini 4121 Skúlin á Argjahamri, og upphæddin flutt á 5717 Ítróttaanlegg.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til, at raksturin av høllini í Skúlanum á Argjahamri frá 1.august 2017 verður flutt til Ítróttaanlegg, og at 123.000 kr. verða fluttar av 4121 Skúlin á Argjahamri á 5717 Ítróttaanlegg.

**Mentamálanevndin 15. juni 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 20. juni 2017:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 20. juni 2017:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 07. september 2017:** Einmælt samtykt.

# 200/17 Góðkenning av mánaðarroknskapinum 2017

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 22.02.2017 | 47/17 | 17/00303-1 |
| 2 Býráðsfundur | 02.03.2017 | 88/17 | 17/00303-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 22.03.2017 | 75/17 | 17/00303-1 |
| 4 Býráðsfundur | 30.03.2017 | 105/17 | 17/00303-1 |
| 5 Fíggjarnevndin | 19.04.2017 | 100/17 | 17/00303-1 |
| 6 Býráðsfundur | 27.04.2017 | 134/17 | 17/00303-1 |
| 7 Fíggjarnevndin | 16.05.2017 | 124/17 | 17/00303-1 |
| 8 Býráðsfundur | 23.05.2017 | 151/17 | 17/00303-1 |
| 9 Fíggjarnevndin | 14.06.2017 | 146/17 | 17/00303-1 |
| 10 Býráðsfundur | 20.06.2017 | 187/17 | 17/00303-1 |
| 11 Fíggjarnevndin | 07.09.2017 | 182/17 | 17/00303-1 |
| 12 Býráðsfundur | 07.09.2017 | 200/17 | 17/00303-1 |

**Málslýsing:**
Sambært kunngerð nr. 89 frá 15. oktober 2008 um roknskaparverk kommununnar o.t. § 10 skulu kommunur innraportera roknskapardátur hvønn mánað til Fíggjarmálaráðið. Sambært § 9 skal kommunustýrið góðkenna.

Roknskapurin fyri januar verður lagdur fram á fundinum.

**Tilmæli:**

**Fíggjarnevndin 22. februar 2017:** Framlagt og góðkent.

**Býráðsfundur 02. mars 2017:** Framlagt og einmælt góðkent.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri februar verður lagdur fram á fundinum

**Fíggjarnevndin 22. mars 2017:** Framlagt og góðkent.

**Býráðsfundur 30. mars 2017:** Framlagt og einmælt góðkent.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri mars verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 19. apríl 2017:** Framlagt og góðkent.

Tróndur Sigurðsson luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 27. apríl 2017:** Framlagt og einmælt góðkent.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Sjúrður Olsen, Bergun Kass, Annfinn Brekkstein, Helena Dam á Neystabø, Bjørghild Djurhuus, Tróndur Sigurðsson, Heðin Mortensen og Gunvør Balle.

**Fíggjarnevndin 16. mai 2017:** Útsett.

**Býráðsfundur 23. mai 2017:** Tikið av skrá.
Ískoyti: Roknskapurin fyri apríl verður lagdur fram á fundinum.
**Fíggjarnevndin 14. juni 2017:** Framlagt og góðkent.

**Býráðsfundur 20. juni 2017:** Framlagt og góðkent.

**Fíggjarnevndin 07. september 2017:** Roknskapurin fyri juli framlagdur og góðkendur.

**Býráðsfundur 07. september 2017:** Framlagt og góðkent.

**FUNDURIN LOKIN KL. 18:30**

**GERÐABÓKIN GÓÐKEND:**

| | | |
|---|---|---|
| Annika Olsen | Helena Dam á Neystabø | Tróndur Sigurðsson |
| Halla Samuelsen | Bogi Andreasen | Jákup Dam |
| Marin Katrina Frýdal | Bjørghild Djurhuus | Gunvør Balle |
| Turið Horn | Bergun Kass | Heðin Mortensen |
| | Kaj Leo Holm Johannesen | |